

*Wayne Rooney avgjørdi Manchester lokalbrakið, við eini sannari perlu av einum saksamáli*

## Wayne Rooney til Manchester United viðhaldsfólkini:

# – Hatta skyldi eg tykkum

**FÓTBÓLTUR** Soleiðis sigur Wayne Rooney um dreyma málið hjá sær, sum avgjørdi grannauppgerðina móti Manchester City og staðfesti, at teir reyðu úr Manchester eru favorittar at vinna 19. meistaraheitið í ár

Tróndur Arge – Anfield

Hann er 25-ára gamal og var fram til mars mánað í fjør millum bestu leikararnir í heiminum. Síðani Wanye Rooney small í gólvið í fyrru hálvfinaluni í Champions League við nógvari pínu, var tað ongin, sum kláraði at stegðað Manchester United framherjanum. Á grasinum á Allianz Arena í Munchen fekk fótbóltsheimurin á fyrsta sinni eina ábending um, at Wayne Rooney er eitt menniskja eins og vit onnur.

Eftir eitt kappingarár har einki var óført hjá manninum við 10-talinum, skrambladi alt saman. Í retur dystinum á Old Trafford gerst sami skaðin verri og Manchester United tapur. Teir megna ikki at vinna meistaraheitið og í Suðurafrika fær Wayne Rooney lítið burturúr, eins og restin av enska landsliðnum.

### Rakar botnin

Byrjanin upp á nýggja kappingarárið er vánalig og stutt eftir, at hann gerst pápi, eru bløðini á tremur við ákærum um, at Wayne Rooney hevur verið ótrúgvur. Avrikini fara frá at vera vánalig til at verða verri. Í Novembur í fjør rakar Wayne Rooney botnin í Manchester United troyggjuni. Hann kunngerð, at hann vil vekk og allur ítróttarfjølmiðlaheimurin er í undantaksstøðu.

Eina viku seinni skrivar Wayne Rooney undir nýggjan sáttmála við Manchester United og gerst samstundis best lønti leikarin í Onglandi. Hóast familjulívið og framtíð er komin upp á pláss, so eru avrikini ikki á sama støðið, sum undan lagnudegnum í Munchen.

### Dreyma málið

Tað var til og við 78. minutt í grannauppgerðini leygardagin móti Manchester United. Hóast Wayne Rooney so seint sum í uppspælinum til málið, vísti tekin um, at hann er eitt sindur frá at toppa aftur, so er næstan einki lýsingarorð, ið kann lýsa tað, sum hendi tíggju sekund seinni.

Við støðuni 1-1 sendur Nani bóltin innfyri úr høgru. Í brotsteiginum er Wayne Rooney í leysari luft og saksasparkar bóltin í málhornið. Eitt mál, sum í nógvar mátar lýsur fótbóltsspælaran, Wayne Rooney. Eitt ótrúliga vakurt, djarvt og týdningarmikið mál, skotið í júst røttu løtu.

### Fyrigivin?

Fyri fleiri Manchester United viðhaldsfólk, so er arrið frá umbønini at sleppa vekk framvegis djúpt. Við vakra málinum leygardagin hevur Wayne Rooney tó goldið eitt sindur aftur fyri umstríddu støðuna og høgu lønina.

Manchester United viðhaldsfólkini hava uppiborið hatta frá mær. Eg havi ikki havt eitt gott kappingarár í ár og eg veit hvussu stóran týdning hesin dysturin er fyri tey, so eg vóni tey nutu málið. Nú er málið at halda fram við at skjóta mál og fáa meistaraheitið aftur, segði Wayne Rooney eftir dystin.

Manchester United vann grannauppgerðina 2-1 við tveimum frálíkum málum frá fyrst Nani og síðani Wayne Rooney. Málið hjá Manchester City skoraði David Silva. Edin Dzeko royndi seg við miseydnaðum skoti, sum fór beint í ryggin á David Silva og snýtti Edwin van der Sar í málinum. Manchester United skal komandi tríggjar dystirnar spæla á útivølli móti Wigan, Chelsea og Liverpool.

### Vónbrotið á Anfield

Sigurin á Chelsea birti bjartar vónir hjá teimum reyðu á Merseyside, ein javnleikur á Anfield móti botnliðnum Wigan gav í nógvar mátar Liverpool eitt »reality check«. Sosialurin var á Anfield, tá Luis Suarez á fyrsta sinni byrjaði inni fyri Liverpool.



*Nýinnkeypti Luis Suarez byrjaði inni fyri Liverpool á fysta sinni*

Fleiri ferðir í ár og í fjør hava tóm setur verið at sæð kring Anfield. Tað var ikki støðan leygardagin, tá Wigan kom á vitjan. Viðhaldsfólkini hava fingið trúnna upp á liðið aftur og einki setur var tómt. Uttanfyri Anfield er gravgangur eftir atgongumerkjum og allastaðni eru fólk, ið vilja vita um nakar hevur eitt eyka atgongumerki.

### Byrja at droyma

Miðskeiðis í fyrra hálvleiki kemur Liverpool eisini á odda við máli frá Raul Meireles. Tað er fimta málið hjá honum í seks dystum. Við málinum komu eisini dreymarnir um kanska, bara kanska Liverpool kann snikja seg við í Champions League komandi ár, tí bæði Tottenham og Chelsea hava verið óstøðug við sínum avrikum.

Seinni hálvleikur er bara tveir minuttir gamal, tá stýrimaðurin á miðvøllinum og málskjýttin, Raul Meireles, verður skiftur út vegna sjúku. Liverpool fær ongantíð tamarhald á miðvøllinum eftir hetta og tað merkist eisini á áskoðaraplássinum.

### »Reality check«

Løtu seinni fær Liverpool verjan ikki ruddað vekk og Wigan javnar eftir innlegg. Í somu løtu rennur veruleikin fram fyri eyguni á teimum annars so bjartskygdu Liverpool viðhaldsfólkunum. Tað er lang upp til fjórða plássið og liðið er framvegis áleið tað sama, sum um ársskiftið var næœri niðurflytingarstrikuni ella fjóða plássinum.

Nýggi framherjin hjá Liverpool, Luis Suarez, var við frá byrjan og royndist væl. Tíverri fyri hann, so rakti hann bæði stongina og tvørstongina, men inn vildi bólturin ikki. Eina stigið var eitt stórt vónbrot og tað sást greitt á áskoðarafjøldini, meðan hon leitaði sær frá Anfield og oman móti miðbýnum.

trondur@sosialurin.fo